# Liðið hjá Allan meistari

**Kappingarárið hjá Føroya Bridge Samband endaði um vikuskiftið, tá ið liðkappingarnar í 1, 2 og 3 deild vóru avgjørdar**



*Frøin var stór, tá tað endaliga varð staðfest, at liðið hjá Allani Dal-Christiansen hevði vunnið liðkappingina í bridge*

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Seinastu umførini vórðu leikt í Klaksvík, og gjørdu fyrireikarinir har eitt framúr gott arbeið, sum tey hava uppiborið allan rós fyri.

Í 1.deild gjørdist liðið hjá Allani- Dal Christiansen føroyameistarar. Væl frammanfyri liðið hjá Boga Simonsen, ið gjørdist nrmmar tvey.

Á liðnum hjá Allani vóru, umframt Allan Dal-Christiansen, Magni Jøkladal, Jóannes Mouritsen, Heðin Mouritsen, Per Kallsberg og Dánjal Pauli Mohr.

### Óli og Marjun upp

Í kappingini í aðru deild var tað Óli Holm, sum fekk eina framskundaða 60-ára føðingardagsgávu, tá liðið hjá honum eftir eina sera spennandi kapping flutti upp í fyrstu deild.

Heilt óvæntað var hetta kanska ikki, tí liðið hjá Óla er mannað við góðum og royndum leikarum, sum allir hava roynt seg í fyrstu deild.

Á liðnum vóru Óli Holm, Páll Augustinussen, Dia Poulsen, Hans Joensen, Birgir Jacobsen og Poul Johannus Joensen.

Í tríðju deild var sjáldan nakar ivi um, hvør skuldi flyta upp. Her var liðið hjá Marjun Restorff klárt besta liðið, meðan liðið hjá Jákupi Egholm gjørdist nummar tvey.

Á liðnum hjá Marjun vóru Marjun Restorff sjálv, Arnleyg Mikkelsen, Petur A. Johannesen, Eilif Petersen, Zacharias Joensen og Salamon Joensen.

### Multihold

Eftir kappingina var ein multihold útrokning gjørd fyri øll pørini, ið hava leikt í 1.deild í ár. Hetta er ein útrokning, sum áleið sigur hvussu tey einstøku pørini hava staðið seg. Í hesum roknistykkinum stóðu Per Kallsberg og Dánjal Pauli Mohr seg best. Heðin og Jóannes Mouritsen gjørdist nummar tvey, og Allan Dal-Christiansen og Magni Jøkladal endaðu á triðja plássinum.

### Grand Prix

Føroya Bridge Samband hevur í ár skipað fyri eini Grand Prix parakapping, ið hevur verið leikt yvir fimm umfør. Her gjørdist Robert Langaard og Eyðun Anthoniussen klárt tað besta parið.

### Endaligu bridge-støðurnar

**1. deild**

| nr. | lið | stig |
|---|---|---|
| 1 | Allan Dal- Christiansen | 221,5 |
| 2 | Bogi Simonsen | 181 |
| 3 | Dia Jacobsen | 168 |
| 4 | Gunnar Mouritsen | 134 |
| 5 | Jóna Gruntveit | 99,5 |
| 6 | MBM | 72 |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Óli Holm | 186 |
| 2 | Hallur Ellingsgaard | 181 |
| 3 | Jórun Johannesen | 149 |
| 4 | Ingolf S. Olsen | 138 |
| 5 | Marita Krosstein | 111 |

**3. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Marjun Restorff | 191 |
| 2 | Jákup Egholm | 142 |
| 3 | Mortan Thomsen | 102 |
| 4 | Rógvi Nielsen | 96 |

# Liðkappingin liðug

**Liðkappingin í judo endaði næstseinasta vikuskifti. Endiligur vinnararnir gjørdust hesi:**



*Hjá teimum yngstu endaði HJF fremst, meðan SJF gjørdist nummar tvey*



*Hjá børnunum vann Havnar Judofelag A við 20 stigum. B-liðið úr Havn hevði 18 stig og C-liði ð8 stig*



*Hjá monnum vann Sunda Judofelag B kappingina við 16 stigum. HJF hevði 8 stig og SjF A hevði 6 stig*